# gi



## ONGAR TABLETTIR

*Nógv tey flestu sum fara við báti úr Sørvági leggja leiðina til Mykinesar. Hósdagin fór kortini eitt fylgi aðra leið. Við skiparanum, Gunnari Skúvadal skuldu donsku gestirnir eina sjóvegis ferð norður um oynna og síðani til Oyrargjógv. Tað var eitt sindur sjaskut í veðrinum, men hetta bilti ikki hjá ferðafólkunum. - Vit hava í øllum førum ikki brúk fyri sjóverkstablettum, segði eitt teirra*



## TORGIÐ

*Í nøkur ár hevur kommunan arbeitt við at fríðka eitt øki niðri í bygdini. Her er ein komin væl áleiðis, eins og myndin vísir. Hús eru tikin niður, og borð og benkur komin ístaðin*



## HAMPA

*Lýðka og væta í luftini, eru bestu umstøður hjá øllum plantuvøkstri, serliga hjá grasi. Til hetta hevur Sørvágs kommuna síni fólk at halda skil á - ella halda niðri. Ein teirra er Herfinn, sum her er í ferð við at hampa økið rundan um kommunuskrivstovuna í bygdini*



## ASFALTERA

*Hósdagin í farnu viku fekk Sørvágur enn einaferð kongaliga vitjan. Hóast talan hesaferð einans var um eina gjøgnumkoyring til Biggjar og aftur til flogvøllin, skuldu drotningahjúnini kortini fáa ein góðan og slættan túr gjøgnum bygdina. Her eru menn í ferð við at asfaltera eitt petti av vegnum. Tað verður kortini ikki bert drotningin, sum fær gleði og gagn av hesum. Eisini gestirnir á vestanstevnu um vikuskiftið fáa fyrimun av hesum*



## GRÓTLAÐING

*Seinastu árini hevur Sørvágs kommuna gjørt eitt stórt arbeiði at fríðka um í bygdini. Eitt av stórverkunum í hesum sambandi er grótlaðingin á vegnum út til havnalagið. Tað er Dia Jacobsen úr Leynum (myndin) sum stendur fyri hesum megnararbeiði. Hóast meginparturin av setninginum er greiddur, fer tað kortini at taka eina tíð enn at gera arbeiðið heilt liðugt*